# FLOYTAN HJÁ SEYÐADREINGINUM

Somu nátt, sum Frelsarin varð føddur, gekk ein fátækur seyðadrongur úti í haganum nær við Betlehem. Hann leitaði eftir einum lambi, sum var horvið. Og tí var tað, hann ikki fylgdist við hinum hirðunum; teimum, sum vit hoyra um í jólaevangeliinum.

Drongurin tænti hjá einum harðrendum húsbónda, og tað kann hava verið ein av teimum, sum átti eitt herbergi í Betlehem. Kom drongurin ikki heim við seyðafylginum í øllum góðum, varð hann skeldaður og sligin. Av tí sama gav hann sær als ikki stundir at leggja til merkis øll tey løgnu tekin, ið hendu. Hann varnaðist ikki, at eingin vindur var longur, hoyrdi ikki fuglarnar fara at láta, sá ikki stjørnurnar skína bjartari enn vant. Gøtan gekk niðan á fjallið, og drongurin leitaði aftan fyri hvønn runn og hvønn stein. At enda var hann komin heilt niðaná, og haðani sá hann út yvir fløturnar, líka til Betlehem.

Tá var tað, at himmalin læt seg upp, náttin varð ljós sum dagurin, og lovsongur ljómaði um heimin. Hvussu stórt tað undrið var, sum hendi í hesi stund, hevur neyvan nakað menniskjað fatað til henda dag. So tað má vera fyrigivið einum lítlum seyðadreingi, at hann ikki beinanvegin skilti boðskapin. Hann hugsaði um lambið, og at hann mátti halda fram at leita. Tá stóð brádliga ein eingil hjá honum, og eingilin segði:

"Ver ikki stúrin um lambið hjá tær! Í hesi stund er ein størri hirði føddur. Far til Betlehem, har Heimsins Frelsari liggur sveipaður í eini krubbu!"

"Heimsins Frelsari," svaraði drongurin. "Til hansara torir eingin at koma tómhentur. Eg eigi onga gávu at geva honum."

"Tak hesa floytuna, og spæl fyri barninum," segði eingilin – og var horvin í somu stund. Men á gøtuni framman fyri dreingin lá ein skyggjandi blonk floyta. Sjey himmalreinar tónar hevði hon og spældi sjálv, so tað var sum eitt undur at seta hana fyri munnin.

Glaður varð drongurin og helt avstað oman gjøgnum líðina. Men har var óslætt, og tá ið hann leyp tvørtur um eina á, snávaði hann og lá so barlangur. Í tí hann datt, misti hann floytuna, og úr munninum stakk eitt orð, sum seyðamenn viðhvørt brúktu. Vakurt var tað ikki. Og tá ið hann fann floytuna aftur, var hon blivin ein tóna fátækari.

Men enn vóru seks tónar heilir, og ikki hevði drongurin stundir at gráta. Gøtan var betri nú, so hann rann alt, hann var mentur. Við eitt bráðsteðgaði hann – á gøtuni beint fyri honum stóð ein stórur úlvur. Lambatýnarin sjálvur! Drongurin varð í øðini. – "Sjúgva teg burtur!" rópti hann. Og áðrenn hann visti av, hevði hann slongt

floytuna eftir beistinum. Í somu løtu var úlvurin burtur, men tað var ein tóni í floytuni eisini.

Nú var drongurin komin oman á fløtuna, har seyðafylgið plagdi at ganga á beiti. Seyðurin hevði lagt seg fyri náttina, alt var kvirt. Bara ein einsamøll ær gekk og jarmaði. Drongurin helt, at hann mátti royna at fáa ærina inn um girðingina, áðrenn hann helt leiðina fram. Hann rann eftir ærini og gloymdi púra, hvat hann hevði í hondini. Tí tá ið ærin ætlaði at rýma, blakaði hann floytuna eftir henni. Ærin var sum farin undir heilt, men floytuna fann hann aftur. Tá vóru bara fýra tónar eftir í henni.

Men hvar mundu hirðarnir vera? At teir lógu á knæ fyri barninum í krubbuni, tað kundi drongurin ikki vita. Hann helt, at teir helst mundu sita á onkrari ølstovu í Betlehem. Tí av og á lótu teir eldru seyðamenninir tann yngsta hava náttarvaktina, meðan teir styttu sær stundir við terningaspæli og einari kannu av øli. – Forargiligt, at hetta skuldi vera júst í nátt. Drongurin varð so argur, at hann sparkaði vatn-krukkuna, sum stóð har hjá leivdunum av bálinum. Í somu løtu var tað, sum ein ósjónligur máttur sló floytuna úr hondini á honum. Tá ið hann tók hana upp aftur, vóru einans tríggir tónar heilir.

Kortini ætlaði hann sær til Betlehem. Og nú gekst alt væl, líka til hann var komin inn um býarportrið. Tá kom ein riðil av dreingjum eftir honum, og teir vildu allir hava fatur á floytuni. Har var levind og gangur og bardagi. Floytuna misti hann ikki, men tá ið vektarin kom at fáa skil á, vóru bara tveir tónar, sum góvu ljóð frá sær.

Men nú sá hann fjósið. Høgt uppi yvir takinum lýsti stjørnan. Í krubbuni lá Frelsari Heimsins.

Og kortini hendi tað, at tá ið drongurin kom inn í fjósið, var bara ljóð í einum tóna. Tí í tí hann gekk fram við hurðini inn á herbergið, leyp tann illi varðhundurin á hann – og so visti hann sær ikki annað at verja seg við enn tað, hann hevði í hondini.

Har stóð hann nú, innan fyri dyrnar í fjósinum, og tordi nóg illa at fara innar til barnið. Hann skammaðist, hvussu lítið var eftir av gávuni. Í fákunnu síni visti hann ikki, at júst soleiðis er leiðin hjá øllum menniskjum til Frelsara Heimsins.

Og so spældi drongurin sín einasta, seinasta tóna við floytuni. Mildur og reinur ljómaði hann fyri barninum. Maria og Jósef, oksin og eslið, øll, sum í fjósinum vóru, lurtaðu og undraðust. Men barnið rætti hondini fram og nam við floytuna. Og í somu stund var hon, eins og tá ið hon kom niður av himli − við øllum tónum, heil og rein.

*Gjeterguttens fløyte. Eftir Dan Lindholm: Små sagn om store ting (Dreyers Forlag, Oslo 1969). Elin Henriksen týddi.*